Til allar tingmenn

LØGTINGIÐ

Løgtingsformaðurin

**12. august 2020**
**j. nr.**
(at tilskila í svari)

Í sambandi við, at Koronafarsóttin aftur hóttir landið, hevur Formansskapurin tikið avgerð um, at sama "serskipan" fyri Løgtingið, sum var galdandi í vár, aftur verður sett í verk, um neyðugt verður at kalla tingið saman at viðgera ávís skundmál, soleiðis at ikki øll 33 skulu møta á fundi.

Hetta er neyðugt, um vit á bestan hátt skulu verja okkum fyri, at ein tingfundur ikki skal enda við, at alt tingið aftaná kemur í sóttarhald, tí ein okkara seinni verður staðfestur sjúkur við Covid-19 virusi. Um tingið møtir á tingfundi í einari minni útgávu, kunnu aðrir tingmenn verða tøkir seinni, um tørvur er á tí. Á hendan hátt kann sum frægast bindast um heilan fingur, eins og smittuvandin við tingfundi minkar.

Sambært § 18 í Stýrisskipanarlógini, kann Tingið ikki taka avgerð um mál, uttan at meira enn helmingurin av tingmonnum eru á fundi, tvs. minst 17 tingmenn.

Gjørdur er ein leistur, sum byggir á verandi tingmannabýti, har bæði flokkar og samgonga/andstøða eru umboðað lutfalsliga javnt. Grundað á hetta hevur formansskapurin við heimild í § 14 í Tingskipanini tikið avgerð um, at 20 tingmenn skulu luttaka á tingfundi, og at hinir verða verandi heima. Hetta er **lóglig frávera** eftir boðum frá Formansskapinum fyri at verja tingið.

Flokkarnir verða umboðaðir soleiðis:

- Fólkaflokkurin 5
- Sambandsflokkurin 4
- Javnaðarflokkurin 4
- Sjálvstýri 1
- Tjóðveldi 4
- Framsókn 1
- Miðflokkurin 1

**Tingbólkaformenninir velja út, hvørji skulu umboða teirra flokk, og geva hinum boð um at verða verandi heima.**

Tað skulu í mesta lagi vera 10 fólk í løgtingssalinum samstundis. Hetta merkir, at hvør flokkur kann hava eitt umboð í salinum.

Tingfundirnir eru ikki almennir, og einans fólk, sum koma her í beinleiðis arbeiðsørindum

tingarbeiðinum viðvíkjandi, hava atgongd. Áhoyrarar og fjølmiðlar hava ikki atgongd til løgtingssalin, meðan hendan skipan er galdandi.

Gjørt skal gera vart við, at umsitingin í tinginum eisini verður skerd til fundin av somu orsøk, og at avmarkingar eru fyri matinum, sum verður serveraður í matarhøllini.

Vinarliga

Jógvan á Lakjuni
løgtingsformaður
/
Johnhard Klettheyggj
løgtingsstjóri